

www.oljan.fo

**Jan Müller** 07 - 02 - 2012

# Føroyingar vælkomnir til Esbjerg

Tað góða við okkara offshore útbúgving er, at tú kanst steðga longu eftir tvey ár og fara út í vinnuna, sigur útbúgvingarleiðarin í Erhvervsakademi Sydvest í Esbjerg. Stórur mangul Eftir at oljan.fo herfyri skrivaði um tann stóra mangulin uppá arbeiðsmegi, sum offshore vinnan í eitt nú Norðsjónum upplivir í hesum døgum, hava lesarar vent sær til okkum og spurt, hvørjir møguleikar eru fyri at førleikamenna seg, so tað verður lætt at koma framat øllum hesum nógvu ósettu størvunum. Vit hava í tí sambandi vent okkum til Erhvervsakademi Sydvest í Esbjerg, sum er ein av fáu skúlunum í donsku útbúgvingarskipanini, ið útbúgvir fólk til offshore vinnuna. Hóast øll tey, sum skúlin útbúgvir, fáa starv beinanvegin, tí trotið á arbeiðsmegi er so stórt, so eru danir sera trekir at bíta á og søkja um upptøku á skúlanum. Nøkta ikki eftirspurning Vit megna ikki at útbúgva nóg nógv til eftirspurningin, og í veruleikanum er tað léttari at fáa útlendingar úr eitt nú Singapore at koma hendavegin, enn tað er at fáa ein úr til dømis Keypmannahavn at søkja inn, segði Jens Høffner útbúgvingarleiðari á Erhvervsakademi Sydvest í Esbjerg við Danmarks Radio herfyri. Oljan.fo hevur tosað við Jens Høffner, fyri at hoyra eitt sindur nærri um útbúgvingarnar. Hann sigur, at bæði í Danmark, Stóra Bretlandi, Týsklandi og Svøríki er eftirspurningurin stórur eftir arbeiðsmegi við teimum røttu førleikunum. "Hjá okkum eita hesar útbúgvingar eitt nú Driftsteknolog Offshore, Installatør ella Produktionsteknolog. Ungfólk, sum hava miðnámsskúla ella eina lærlingaútbúgving innan el, motor, mekanik ella smiðju eru klár at sleppa inn hjá okkum", sigur Jens Høffner við Oljan.fo. Førleikar geva møguleikar Hóast tað ber til at fara allan vegin, og eftir fýra árum enda sum Bachelorur innan offshore rakstrartøkni, so kunnu tey, sum ikki hava so góðan hug at sita á skúlabeinki, velja at gevast eftir tveimum árum og longu tá hava førleikar at arbeiða sum rakstrartøkningur

(driftsteknolog). Fulla útbúgvingin sum rakstrartøkningur (driftsteknolog) við yvirbygninginum, ið tekur fýra ár og endar á Bachelor stigi, líkist nógv maskinmeistaraútbúgvingini, sum vit kenna hana. Men ein munur er, at fak innan leiðslu spæla ein størri leiklut enn tann siðbundna útbúgvingin til maskinmeistara vanliga ger, sigur Jens Høffner. Erhvervsakademi Sydvest er á finna á www.easv.dk.